

# Føroysku oljufeløgini við í norskari útbjóðing

**Jan Müller**

13.09.2013 - 19:38

Oljan.fo

Áhugin fyri at leita eftir olju og gassi í kendum norskum olju- og gassøkjum er stórur. Ikki færri enn 50 oljufeløg eru áhugað í at søkja um nýggj leitiloyvi, teirra mllum bæði tey føroysku oljufeløgini, Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum. Eisini er eitt íslendskt felag við í útbjóðingini. Tað er Eykon Energy, har ein gamal kenningur frá oljuleitingini við Føroyar, Terje Hagevang, er við. Hann er teirra jarðfrøðiligi ráðgevi. Hann var við íleitingini við Føroyar fyrst við Saga, síðani við Sagex og at enda við Valiant.

Endamálið við hesi útbjóðingini er at fáa feløg at vísa áhuga fyri økjum á norska landgrunninum, har framleiðsla longu er og har undirstøðukervið er væl útbygt.

Myndugleikarnir vilja hava oljufeløg at leita eftir olju og gassi í økjum, har olja og gass longu er funnið. Verða minni fund gjørd, verður mett, at hesi kortini kunnu útbyggjast, tí tey kunnu gera brúk av verandi undirstøðukervi.

Norski oljumálaráðharrin Ola Borten Moe sigur við norskar miðlar, at tað er gleðiligt, at áhugin fyri hesi útbjóðingini í búnum økjum er so stórur. Ætlanin er at lata nýggj loyvi longu í januar næsta ár. Talan snýr seg um loyvi bæði í syðra parti av Norðsjónum, Miðnorra og í Barenshavinum.

Feløgini, sum søkt hava, eru:
A/S Norske Shell, Atlantic Petroleum Norge AS, Bayerngas Norge AS, Bridge Energy Norge AS, Capricorn Norge AS, Centrica Resources Norge AS, Chevron Norge AS, Concedo ASA, ConocoPhillips Scandinavia AS, Core Energy AS, Dana Petroleum Norway AS, Det norske oljeselskap ASA, Dong E&P Norge AS, E.ON Ruhrgas Norge AS, Edison International SpA, ENI Norge AS, EnQuest Norge AS, Explora Petroleum AS, ExxonMobil Exploration and Production Norway AS, Eykon Energy AS, Faroe Petroleum Norge AS, Fortis Petroleum Norway AS, GDF SUEZ E&P Norge AS, Idemitsu Petroleum Norge AS, Ithaca Petroleum Norge AS, Lime Petroleum Norway AS, LOTOS Exploration & Production Norge AS, Lundin Norway AS, Maersk Oil Norway AS, Marathon Oil Norge AS, Moeco Oil & Gas Norge AS, North Energy ASA, Noreco Norway AS, OMV Norge AS, Petrolia Norway AS, PGNiG Norway AS, Premier Oil Norge AS, Repsol Exploration Norge AS, Rocksource ASA, RWE-Dea Norge AS, Skagen44 AS, Spike Exploration Holding AS, Statoil Petroleum AS, Svenska Petroleum Exploration AS, Suncor Energy Norge AS, Talisman Energy Norge A/S, Total E&P Norge AS, Tullow Oil Norge AS, VNG Norge AS, Wintershall Norge ASA